# Samráðingarleiðari

Nú ið sáttmálasamráðingar standa fyri durum, søkja vit eftir einum samráðingarleiðara.

Starvið er fult av avbjóðingum, umhvørvið er gott við góðum samstarvsfelagum. Vit leggja dent á, at Lønardeildin virkar væl og at arbeitt verður á høgum stigi, og tí bjóða vit tær góðar skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikar.

Tað er týdningarmikið, at tú ert fyrikomandi, dugir at laga teg eftir umstøðunum og hevur støðufesti.

Sum dømi um uppgávur í starvinum kunnu verða nevnd:
- sáttmálasamráðingar
- málsviðgera flokkingarmál
- gera vegleiðingar og rundskriv um lønar- og setanarviðurskifti
- tulka lógir og avtalur.

Vit kundu hugsað okkum, at tú hevur útbúgving á kandidatstigi, og at tú hevur royndir, sum eru góð barlast í sáttmálasamráðingum.

Hevur tú útbúgving á kandidatstigi, eru lønar- og setanarviðurskiftini eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi akademikarafelag, t.e. Magistarafelagið, Verkfrøðingafelagið ella Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya.

Starvið verður sett sum skjótast.

Vilt tú vita meiri um starvið, kanst tú ringja til Duritu Tausen, stjóra, á telefon 352200 ella senda eitt teldubræv til durita@lnd.fo

Vit skulu hava umsóknina innan 14. juli í 2005 kl. 12.00. Hon skal verða send Fíggjarmálaráðnum, Lønardeildini, Postboks 2039, 165 Argjum.

FMR
Lønardeildin

*Fíggjarmálaráðið, lønardeildin, hevur ábyrgd av landsins arbeiðsgevaraheimildum, ið viðvíkja lønum og setanartreytum.*

*Høvuðsuppgávurnar hjá lønardeildini eru:*
- *at samráðast við fakfeløg um sáttmálar og avtalur fyri størv hjá landinum*
- *at umsita tænastumannalóggávuna*
- *at flokka størv og at góðkenna individuellar treytir*
- *at ráðgeva hinum ráðunum í arbeiðs- og setanarrættarligum spurningum*

Fíggjarmálaráðið, lønardeildin · Traðagøta 39 · Postsmoga 2039 · FO-165 Argir · Tlf. 35 22 00 · Fax 35 22 01 · E-mail: lnd@lnd.fo · www.lnd.fo

Sosialurin 341800

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Svimjihøllin**
Í høllini starvast 20 fólk. Starvsfólki skal upp til lívbjargararoynd eina ferð um árið. Tey nema sær eisini viðkað skeið í fyrstuhjálp

**Upplatingartíðir í summar frá 20. juni til 6. august:**
mánadag 6.45 - 20.00
týsdag 6.45 - 20.00
mikudag 6.45 - 9.00
hósdag 6.45 - 20.00
fríggjadag 6.45 - 20.00
leygardag 9.00 - 17.00
sunnudag: 8.00 - 10.00 og 14.00 - 17.00

www.svimjihollin.fo

# Lívbjargari

Søkt verður eftir einum manni sum lívbjargara til svimjihøllina.

Starvið fevnir umframt arbeiðið sum lívbjargari um at taka eina hond í ymiskt í tí dagliga.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal vera góður svimjari og hava stóru lívbjargararoyndina, annars verður skipað fyri lívbjargararoyndini á staðnum. Heilsuváttan má útvegast.

**Setanarviðurskifti**
Talan er um eitt fulltíðarstarv, ið er skipað í vaktum. Starvið verður sett sum skjótast. Løn sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Hera Olsen, svimjihallarleiðara, tlf. 30 20 72 ella Jákup Simonsen, deildarleiðara á mentamáladeildini tlf. 30 20 10.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, postsmogu 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 18.juli 2005. Viðmerk "Lívbjargari" á umsóknina.

# Koyri-kort?

Teoriskeið til motorsúkklu byrjar **týsdagin 05.07 kl. 19.30**

SISLERO 281800

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

**Stanley A. Olsen**
koyrilærari
**tel 21 10 99**

**John A. Christiansen**
koyrilærari
**tel 21 47 75**

**Jekaragøta 10 • Tórshavn**

# Dagrøktari/ gestadagrøktari

## Til Runavíkar kommunu

Søkt verður eftir avloysar fyri dagrøktara í farloyvi og gestadagrøktara í Runavíkar Kommunu, at byrja 15.august 2005.

Viðkomandi skal hava áhuga og hegni at arbeiða við børnum
.

Dagrøktarheimið skal verða soleiðis innrættað, at tað er gott og trygt at spæla innan- og uttandura.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast hjá dagrøktarleiðaranum á tlf. 448594 lok. 10

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi seinast fríggjadagin 11. juli 2005 og sendast til

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará

Rigsombudsmanden på Færøerne

# Afskedsreception

Om kort tid fratræder jeg min stilling som rigsombudsmand og siger farvel til Færøerne for denne gang.

I den anledning vil det glæde mig at se samarbejdspartnere fra landsstyre, lagting og diverse myndigheder m.v. til en reception på Rigsombudet torsdag den **30. juni 2005 kl. 15–17.**

Venlig hilsen

Birgit Kleis

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3984**
**Navn:** Sp/f Føroya Tubbakssøla
**Adressa:** Velbastaðvegur 43 100 Tórshavn
**Kommuna:** Tórshavnar
**Stovningardato:** 23-06-2005
**Viðtøkudato:** 23-06-2005
**Stovnarar:**
Kári Slættanes, Dr. Dahlsgøta 1, 100 Tórshavn
**Stjórn:**
Kári Slættanes, Dr. Dahlsgøta 1, 100 Tórshavn, (stjóri)
**Grannskoðari:**
Sp/f Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen,skrás.grannsk, J. Broncksgøta 16, Box 16, 110 Tórshavn
**Partapeningur:** kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handil, keyp og annað virksemi í hesum sambandi.
**Roknskaparár:** 01.01 - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:**
01.07.2005 - 31.12.2006

Skráseting Føroya
tann 28. juni 2005

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 791**,
P/F Bygningssnikkaravirkið B S V, 110 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:**
27.06.2005
**Navn:**
**Nýtt navn:** P/F B.S.V. Fastogn

Skráseting Føroya
tann 28. juni 2005

Kristin Balle

# Broytt avgreiðslutíð

Frá 1. juli 2005 verður avgreiðslutíðin á Politistøðini á Tvøroyri

**mánadag til fríggjadag kl. 10:00 - 15:00**

Sýslumaðurin

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Sethús ynskjast til keyps

Vegna starvsfólk á Náttúruvísindadeildini verður søkt eftir sethúsum til keyps í Suðurstreymi.

Áhugað verða biðin um at seta seg í samband við Hans Paula Joensen á Náttúruvísindadeildini, tlf. 352558